**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI STÓRUBREKKU**

SB_Hoyvík_Stórabrekka_2023_X_202X

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta skjali 1, matr. nr. 138a, Hoyvík, og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa økið til røktarheim, samsvarandi skjali 2.

Stk. 2. Økið liggur í D3 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlað stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkum.

Stk. 3. Sambært kap. II, § 19, stk. 2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett fyri D3 øki, at útstykking og bygging einans verður loyvd sambært serstakari byggisamtykt.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtyktini, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS OG ÁSETINGAR Í ØKJUNUM

Stk. 1. Økið verður lagt til røktarheim og røktaríbúðir, og tænastuvirki, ið hava samband við hetta.

Stk. 2. Byggjast skal einans innan ásetta byggilinju, samsvarandi skjali 2.

Stk. 3. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25.

Stk. 4. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,50.

Stk. 5. Mest loyvda hædd er 14 m frá planering.

Stk. 6. Bygging skal ikki fara upp um hæddarkurvu 127, sí prinsipp skurð á viðhefta skjali 3.

## §4. PARKERING OG VEGIR

Stk. 1. Gerast skulu í minsta lagi 1,0 parkeringspláss pr. 75 $m^2$ húsavídd.

Stk. 2. Vegir og parkering skulu annars gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og Bygningskunngerðini 2017.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifulltrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6. BYGGINMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk,

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 23/25338 |
| Ætlanarskriv: | |
| Góðkent: | 15/2-2024 |
| Váttað: | KPoulsen |




| | |
|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna** | |
| **Býarskipanardeildin** | |
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Stórubrekku |
| **Undirheiti** | Skjal 1 |
| **Mát** | 1:3.000 |

| **Dagur** | 18.10.2023 | **Journal** | 23/05639 | **Tekna** | RVH |
|---|---|---|---|---|---|




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Stórubrekku | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 2 | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 18.10.2023 | **Journal** | 23/05639 | **Tekna** | |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Stórubrekku | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 3 | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 18.10.2023 | **Journal** | 23/05639 | **Tekna** | |

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar Kommuna
Postbox 32Vaglið
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 15. februar 2024
J. nr.: 23/25338-4
Viðgjørt: KHP
Tygara skriv: 23/05639

***Góðkenningarskriv***

**Serstøk byggisamtykt fyri Stórubrekku**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna í telduposti dagfestum 13. desember 2023 sent Umhvørvismálaráðnum uppskot til nýggja serstaka byggisamtykt fyri Stórubrekku, matr. nr. 138a, Hoyvík, til góðkenningar.

Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at skipa økið til røktarheim.

Broytingin hevur ligið frammi frá 30. oktober til 11. desember 2023. Tá ið freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var farin, 11. desember 2023, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot fingið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og í skrivi dagfestum 9. februar 2024 viðmælir býarskipanarnevndin serstøku byggisamtyktina fyri Stórubrekku.

Sagt verður frá, at Umhvørvismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri Stórubrekku.

Sambært § 7, stk. 1, í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir skal kommunan kunngera byggisamtyktina, beinanvegin hon er góðkend. Byggisamtyktin fær gildi, tá ið hon er kunngjørd.

Sambært § 3, stk. 1, í kunngerð nr. 122/2023 um lendisskrá skal kommunan senda Umhvørvisstovuni byggisamtyktina í seinasta lagi fýra vikur eftir, at hon er góðkend av Umhvørvismálaráðnum.

Mint verður á, at hóast Umhvørvismálaráðið nú hevur góðkent serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn eftir reglunum í býarskipanarlógini, sleppur kommunan ikki undan at fáa til vegar møguligar aðrar góðkenningar, sum krevjast frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt hesum góðkenningarskrivi er serstaka byggisamtyktin fyri Stórubrekku við átekning frá Umhvørvismálaráðnum.

Vegna Umhvørvismálaráðið

Kristvør Hentze Poulsen